Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	07.03.2023
Mál nr.:	22/02357
Málsviðgjørt:	DH
Ummælistíð:	07.02.2023 – 21.02.2023
Eftirkannað:	23. februar 2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunustýri (Kommunustýrislógin)
(Broyting av skuldarmarki)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003 og løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018, verður § 43, stk. 2 orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Er nettoskuldin meira enn árliga inntøkugrundarlagið hjá kommununi frá persónsskatti og flytingum frá landinum, krevst loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvussu inntøkugrundarlagið og nettoskuldin skal roknast."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í eftirmeting av eldraøkinum, *Frágreiðing frá arbeiðsbólki, Desember 2021*, sum finst á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni,verður mælt til at broyta skuldarmarkið hjá kommununum soleiðis, at markið verður sett í mun til samlaðu inntøkurnar hjá kommununum.

Tá eldraøkið varð lagt út til kommunurnar at umsita, fingu kommunurnar samstundis fleiri inntøkur gjøgnum eftirlønarskattin umframt endurgjald fyri inntøkumiss, sum kommunurnar hava orsakað av serskattaskipanum. Hesar nýggju inntøkurnar fylla alsamt størri part av inntøkunum hjá kommunum, meðan tað bara eru persónsskattainntøkurnar sum avmarka, hvussu nógv kommunurnar kunnu lána. Inntøkurnar frá eftirlønarskatti verða veittar eftir tali av eldri yvir 67 ár. Aldurssamansetingin er ymisk kring landið soleiðis, at talið av pensjónistum eitt nú er lutfalsliga størri í suðurøkinum í mun til norðari (sí talvu).
Hetta hevur við sær, at tær kommunur, har inntøkurnar frá serliga eftirlønarskatti fylla nógv, í størri mun enn aðrar kommunur, verða forðaðar at upptaka skuld.

Partur av fólkunum, sum eru 67 ár og eldri (2022)			
Húsavíkar kommuna	34%	Fuglafjarðar kommuna	18%
Fámjins kommuna	33%	Sørvágs kommuna	17%
Skúvoyar kommuna	29%	Kunoyar kommuna	16%
Skálavíkar kommuna	28%	Hvannasunds kommuna	16%
Porkeris kommuna	24%	Klaksvíkar kommuna	16%
Fugloyar kommuna	24%	Vága kommuna	16%
Hovs kommuna	23%	**Alt landið**	**16%**
Sumbiar kommuna	21%	Runavíkar kommuna	15%
Sands kommuna	21%	Eiðis kommuna	15%
Skopunar kommuna	21%	Tórshavnar kommuna	15%
Vágs kommuna	20%	Nes kommuna	14%
Hvalbiar kommuna	20%	Viðareiðis kommuna	14%
Vestmanna kommuna	20%	Sunda kommuna	14%
Tvøroyrar kommuna	20%	Sjóvar kommuna	14%
Kvívíkar kommuna	19%	Eysturkommuna	14%

1.2. Galdandi lóggáva

Í dag er § 43, stk. 2 soljóðandi:
“Er nettoskuldin meira enn ein álíkning eftir einum av landsstýrismanninum árliga ásettum skattaprosenti, krevst loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum”

Hetta skattaprosentið er ásett til 23% í kunngerð nr. 12 frá 11. februar 2003 um útrokningarskattaprosent sambært kommunustýrislógini.
Nýtt ásett skattaprosent er ikki ásett síðani, hóast tað stendur, at hetta skal lýsast árliga. Tískil er 23% brúkt sum ásett skattaprosent síðani 2003.

Ásetingin skal skiljast soleiðis, at um ein kommuna í einum skattaári fær 2.000.000 kr. inn í inntøkuskatti, og kommunuskatturin er 20%, so verður skuldarmarkið roknað til:

2.000.000 kr. * (23/20) = 2.300.000 kr.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at dagføra og javnstilla kommunur soleiðis, at skuldarmarkið hjá kommununum verður sett í mun til inntøkugrundarlagið í kommununum.

Ætlanin er, at eftirlønarskatturin og endurgjaldið, sum kommunurnar fáa fyri DIS, FAS og aðrar frádráttir skulu verða tikin við, tá skuldarmarkið skal ásetast. Eftir ætlan verður partafelagsskatturin ikki partur av skuldarmarkinum, tí at hesar inntøkur kunnu sveiggja nógv og tí órógva.

Lógarbroytingin gevur landsstýrismanninum heimild til at nágreina skuldarmarkið, soleiðis at møguleiki er at taka fleiri ting við, um inntøkugrundarlagið hjá kommununum broytist í framtíðini. Harafturat gevur nýggja ásetingin heimild til at nágreina, hvussu nettoskuldin skal roknast.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Eftir tilmæli frá arbeiðsbólkinum, sum eftirmetti eldraøkið, verður ásetingin broytt, sum ásetur skuldarmarkið hjá kommunum, soleiðis at eisini veitingar frá landinum telja við. Landsstýrismaðurin fær heimild at áseta nærri reglur fyri, hvussu inntøkugrundarlagið, og harvið skuldarmarkið, skal roknast. Somuleiðis fær landsstýrismaðurin heimild at áseta reglur fyri, hvussu nettoskuldin skal roknast.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið varð sent til ummælis hjá Kommunufelagnum, Løgmálaráðnum, Landsbanka Føroya, Gjaldstovuni, Felagnum Peningastovnar og lagt út á hoyingarportalin.

Inn komu ummælisskriv frá Kommunufelagnum, Landsbanka Føroya og Gjaldstovuni. Fylgiskjalið 2 til lógaruppskotið er ummæliskjal, sum stutt tekur saman um innkomnu ummælisskrivini.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið breiðkar inntøkugrundarlagið, sum ásetir skuldarmarkið hjá kommunum. Tí hevur uppskotið fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar, tí at skuldarmarkið verður broytt. Broytingaruppskotið broytir tó hvørki inntøkurnar ella útreiðslurnar hjá kommununum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið breiðkar inntøkuhugtakið, sum liggur til grund fyri skuldarmarkið hjá kommunum. Tað merkir, at tær kommunur, har eftirlønarskatturin og endurgjaldið fyri serskipanir fyllir lutfalsliga nógv, verða betur stillaðar í mun til aðrar kommunur. Sum yvirlitið í almennu viðmerkingunum vísir, eru tað serliga kommunurnar í Suðuroy og í Sandoynni, har stórur partur av fólkinum er yvir 67 ár, og har eftirlønarskatturin fyllir nógv.

Broytingaruppskotið broytir tó bara upp á lánimarkið hjá kommununum. Við hesum uppskoti vera hvørki inntøkurnar ella útreiðslurnar hjá kommununum broyttar.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur onga ávirkan á nakran millumtjóðasáttmála.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur onga ávirkan á nakran tvørgangandi millumtjóðasáttmála.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær nakra markaforðing.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Eingir skattir ella avgjøld verða ásett við hesum lógaruppskoti.

2.12. Gjøld
Broytingaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum nakrar skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild at áseta nærri reglur um, hvussu inntøkugrundarlagið skal roknast. Í verandi lóg hevur landsstýrismaðurin heimild at lýsa eitt ásett skattaprosent, men í broytingaruppskotinum verður hendan heimild víðkað, soleiðis at landsstýrismaðurin hevur størri frælsi til at nágreina, hvussu inntøkugrundarlagið, og harvið skuldarmarkið, skal roknast.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki við sær aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Ja	ja	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
§ 43, stk. 2 verður broytt soleiðis, at skuldarmarkið hjá kommunum í størri mun verður sett í mun til samlaða inntøkugrundarlagið hjá kommunum og ikki bert í mun til inntøkuskattin.
Í uppskotinum verða umframt inntøkuskattin, eisini flytingar frá landinum nevndar. Her verður hugsað um eftirlønarskatt og endurgjald fyri skattaserskipanir, sum kommunurnar í dag fáa, men orðingin er við vilja breitt orðað, soleiðis at til ber at taka fleiri flytingar við í framtíðini.

Í verandi lóg stendur, at landsstýrismaðurin árliga lýsir eitt ásett skattaprosent. Í broytingaruppskotinum stendur einki um nakað ásett skattaprosent, ella hvussu inntøkurnar frá persónsskatti skulu skiljast. Hetta fær landsstýrismaðurin nú heimild til at áseta nærri reglur um. Harafturat er orðingin um, at nakað skal lýsast árliga, tikin burtur. Tað eru 20 ár síðani nakað ásett skattaprosent varð lýst, og tað er eingin orsøk til, at hetta skal gerast á hvørjum ári.

Somuleiðis fær landsstýrismaðurin heilmild til at nágreina, hvussu nettoskuldin skal roknast. Hendan áseting er komin í, eftir at lógin hevur verið til ummælis. Í verandi lóg er nettoskuldin hjá kommunum ikki nágreinað nærri. Við lógarbroytingini verður lagt upp til, at siga hvussu nettoskuldin skal roknast. Ítøkiliga fer hetta ikki at broyta nakað, men tað verður greiðari fyri kommunurnar, fyrisitingina og onnur, hvussu nettoskuldin verður gjørd upp.

Til § 2
Talan er um áseting um gildiskomu. Ásetingin hevur við sær, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fíggjarmálaráðið, 07. mars 2023

Ruth Vang
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummælisskjal
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Kommunufelagnum
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Landsbanka Føroya
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Gjaldstovuni